# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Christian C. Nielsen, P/f Trygd:

## Móttøka fyri tryggingar-stjóranum

**Fríggjadagin 20. februar var móttøka í Odd Fellow húsinum við Grønlandsvegin í Havn í sambandi við at stjórin á tryggingarfelagnum Trygd, Christian C. Nielsen, hevur rundað tey fimmti**

Nógv fólk nýttu høvið at heilsa upp á tryggingarstjóran Christian C. Nielsen hendan dagin, tá hann hátíðarhelt sín 50 ára føðingardag. Sjálvur føðingardagurin var fyri góðum tveimum mánaðum síðan, tann 20. desember 2003.

Christian er dani og er ættaður úr Kerteminde. Hann tók í 1981 løgfrøðisligt embætisprógv á universitetinum í Århus. Hann hevur starvast sum fulltrúi á Ankenævnet for Forsikring, og sum deildarstjóri í tryggingarfelagnum Østifterne, og haraftrat sum deildarstjóri hjá GF Forsikring.

Christian kom til Føroya í november 1997, tá hann varð settur sum stjóri hjá Trygd, í sambandi við at Trygd varð endurstovnað og fór undir at tekna tryggingar. Hann hevur staðið á odda fyri at víðka um virksemið hjá Trygd til í dag at fevna um nærum øll sløg av tryggingum.



*Tryggingarstjórin, Christian C. Nielsen, og konan, Lis, á móttøkuni í Odd Fellow húsinum seinasta fríggjadag*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, heilsar her upp Christian, millum teir sæst Birger Andersen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Hans Dávid Hansen, frá Tórshavnar Sløkkiliði, handar her Christiani eina gávu frá sløkkiliðnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nógv fólk stukku inn á gólvið henda dagin, og fleiri høvdu blómur og gávur við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúli:

## Húsasmiðir prógv á Tekniska Skúla

**Fríggjadagin 20. februar vórðu níggju húsasmiðir lidnir við sveinaroyndina og fingu prógv handað á trædeildini á Tekniska Skúla í Havn**



***Aftara rað:*** *f.v. Hans David á Brúnni, Skipanes, lærupláss: Svenn Olsen Syðrugøta, Jákup Danielsen, Hvítanes, lærupláss: Sp/f Høgni Mikkelsen, Tórshavn, Gunnar Grækarisson, Tórshavn, lærupláss: P/f Jørgen Christiansen, Hvítanes, Sigmund Johannesen, Signabøur, lærupláss: Sp/f Bulur, Signabøur, Rógvi Ludvig, Hvalba, lærupláss: Valbjørn Dalsgarð, Argir, J. Bergur Lützen, Tórshavn, lærupláss: Sp/f Búsetur, Argir,* ***Fremra rað:*** *f.v. Kristian Niclasen, Tórshavn, lærupláss: Sp/f Høgni Mikkelsen, Tórshavn, Arthur Petersen, Tórshavn, lærupláss: Valbjørn Dalsgarð, Argir, Rúni Skaalum, Hvalba, lærupláss: Sp/f Petur Hammer, Tvøroyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dagurin

**24. februar. Leypársmessa.** Fjórða hvørt ár varð ein dagur taldur afturat í februar mánaði, so at hann fekk 29 dagar. Hetta var ein fyriskipan í tíðarrokning okkara, sum skuldi fáa ár og dagar at sam-svara við gongd sólarinnar. Hann var vanliga hildin 24. februar, men 25. februar, tá ið leypár var. Dagurin kundi líka so væl verið 29. februar, sum vanliga verður hildið nú á døgum.

Navnið *leypársmessa* hevur ongan bíbilskan ella kirkju-ligan uppruna, men heitið *messa* er bara sett á dagin, av tí at hann hevði eina serstøðu í álmanakkanum sum aðrar *messur* og *vøkur*.

Dagurin ber eisini navnið Mattias eftir tí manninum, sum við lutakasti var taldur saman við hinum ellivu ápostlunum í staðin fyri Judas Iskariot. Hann sigst at vera hálshøgdur.

*Niels Winther doyði hendan dagin í 1892*

## Fernisering í Ribarhúsi í Fuglafirði



TÍÐINDASKRIV

**Leygardagin 21. februar 2004 lat ein framsýning upp í Ribarhúsi í Fuglafirði**

Tað eru børnini í Dagstovninum sum sýna fram, tað sum tey hava gjørt – vanligt barnagarðsítriv og sum nakað heilt serligt, er eisini ein "listaframsýning" við málningum, tekningum og trælist.

Úr Fuglafirði fréttist, at nógv fólk vitjaðu framsýningina í vikuskiftinum.

Framsýningin er opin frá kl. 15.00 - 17.30 - til og við mikudagin 25. februar.





MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddu barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin